

*-Eg minnist væl, tá eg fór í Kiosk Aktiv um kvøldarnar at keypa bløð, møtti eg ofta fólki, sum altíð vóru klár at bjóða mær ein lítlan. Tá eg legði av at drekka, sá eg ongantíð hesi fólk aftur.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tostin hvarv bara

**-Tað var bara vanligt vit og skil, sum segði mær, at eg kundi ikki halda fram við at drekka. Tá eg hevði tikið avgerðina, var tosturin burtur, og tað sigur mær so mikið, at tostin ikki situr í hálsinum, men millum oyrini, sigur Árni Gregersen, sum í komandi mánaði ikki hevur smakkað sær á í 17 ár.**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Dagurin situr framvegis rimmarfastur í minninum. Líradagur 26. august 1988. Henda dagin fór fyrrverandi stjórin í SVF og sitandi tíðindaleiðarin á TV2 Bornholm, Árni Gregersen, í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Hann hevði drukkið illa síðan fyrst í áttatiárunum, og ein dag august í 1988 valdi hann endaliga at seta proppin á fløskuna.

-Tað var komið so langt, at eg bæði hevði mist arbeiðið og familju, um eg helt fram. Eg hevði eitt tíðarskeið á eini seks til sjey ár, har drekkingin bara vant upp á seg. Eg drakk ikki hvønn dag, men drakk hinvegin í tørnum, greiðir 54 ára gøtumaðurin frá.

Spurdur, hvussu tíðindamaðurin og familjumaðurin Árni Gregersen fekk gerandisdagin at hanga saman, tá rúsdrekka tók yvirhond, svarar fyrrverandi stjórin í Sjónvarp Føroya:

-Nógv fólk vita, at tað ikki altíð eydnaðist at halda arbeiðið og rúsdrekka atskilt.Tað var tó hvørki tá, ið eg var í útvarpinum ella sjónvarpinum beinleiðis, at tað hendi, men undir onkrum uppgávum, tá ið upptøkur vóru gjørdar varð tað heldur stuttligt.

Gøtumaðurin minnist serliga á ein pínligan tilburð, meðan hann var í arbeiðsørindum.

-Einaferð gekk heilt galið. Eg fór til Tvøroyrar fyri Útvarpið at siga frá einum dysti. Eg var heldur illa fyri, og tá eg so møtti nógvum blíðum fólki, tók eg ov nógv til mín. Úrslitið bleiv, at tá eg skuldi siga frá dystinum var lítið og einki skil á. Ein ógvuliga pínlig og skammfull hending, fortelur Árni Gregersen.

## Eitt høgg

Árni Gregersen er langt frá einasti maður, sum eitt tíðarskeið hevur havt trupulleikar við rúsdrekka. Hann hoyrir kortini óiva millum teir fáu føroyingar, sum hevur eydnast at gerast turrlagdur eftir fyrstu royndina á viðgerðarstovni.

Spurdur, hvør orsøkin er til, at hann megnaði at leggja rúsandi løgin frá sær eftir fyrstu royndina í viðgerð, svarar hann:

-Eg havi onga forklåring upp á tað. Tað var bara vanligt vit og skil, sum segði mær, at eg kundi ikki halda fram við at drekka. Tá eg hevði tikið avgerðina, var tostin burtur, og tað sigur mær so mikið, at tostin ikki situr í hálsinum, men millum oyrini.

Eftir væleydnaðu viðgerðina í Íslandi vendi Árni Gregersen aftur til ein vanligan gerandisdag í Føroyum, men hann varnaðist okkurt var broytt.

-Eg minnist væl, tá eg fór í Kiosk Aktiv um kvøldarnar at keypa bløð, møtti eg ofta fólki, sum altíð vóru klár at bjóða mær ein lítlan. Tá eg legði av at drekka, sá eg ongantíð hesi fólk aftur. Eg havi heldur ongantíð sæð hesar menninar, sum hildu til í ymiskum kjallaraíbúðum í Eysturbýnum, síðan, fortelur Árni Gregersen smírandi.

## Ein Gregersen

Árni Gregersen er føddur í Norðagøtu í 1951. Hann er sostatt uppvaksin í teimum trongu 50 árunum. Kortini klagar bulmikli gøtumaðurin ikki. Pápi Árna var bæði bóndi og sjómaður, so familjan Gregersen hevði nóg mikið av bæði kjøti og fiski.

At eita Gregersen til eftirnavn í Gøtu er nakað heilt serstakt. Gregersen menninir hava altíð borið orð fyri at vera ágrýtnir og virkisfúsir vinnulívsmenn, sum dáma væl at ráða.

Spurdur, um tað nakrantíð hevur kenst strævið at vera av Gregersen slagnum í einum lítlum lokal samfelag sum í Gøtu, svarar Árni